DAGSINS MEINING

Ráðstevna um trygd og tunlar

Eftir at hava hoyrt um óhugnaligar vanlukkur í fjallatunlum í Alpunum nú fleiri ferðir, har mong menniskju eru brend í hel, hava helst mangir føroyingar gjørt sær tankar um, at hetta eisini kann henda her heima hjá okkum. Og hetta hevur so fingið fólk at spyrja um trygdina í okkara tunlum.

Tað vísir seg tíanverri at verða so, at einki ítøkiligt hendir, fyrr enn ein vanlukka er hend. Hetta kenna vit alla staðni frá. Nú hendi so ein vanlukka í einum av okkara tunlum, men til alla lukku kom eingin til skaða. Men vrakið av tí fullkomiliga útbrenda bussinum stendur tó sum ein álvarsom ávaring til avvarandi myndugleikar. Spurningurin er so, um henda ávaring er nóg stór til, at málið verður raðfest hægri.

At eldur kemur í ein buss er nakað, sum kann henda. Men spurningurin tá er, um trygdarútgerðin er í lagi og um starvsfólk eins væl og ferðandi vita, hvussu man skal fyrihalda sær í slíkari vandastøðu.

Uppá fólkatalið hava vit í Føroym sera nógvar tunlar, og nú tveir undirsjóvartunlar koma aftrat er greitt, at trygdin í sambandi við tunlar eigur og má setast í hásæti. Men hvussu er tá stætt við trygdini í verandi tunlum og hvussu hava myndugleikarnir tryggjað komandi undirsjóvartunlar móti slíkum vanlukkum. Hetta eru spurningar, sum eiga at verða viðgjørdir her og nú.

Fyri at hetta ikki bara skal blíva eitt upplop hevði tað verið rætt, um t.d. stjórin á Ráðnum fyri Ferðslutrygd tók telefonina og ringdi til stjóran í Norðurlandahúsinum og bað um innivist tíðliga í vár til eina ráðstevnu um trygdina í okkara verandi og komandi tunlum. At sakkøn fólk komu úr útlandinum at greiða frá, og at gjørd var ein fullkomin gjøgnumgongd av øllum verandi tunlum í landinum. At sakkøn fólk og vanligir brúkarar av tunlunum kundu sitið saman og viðgjørt hetta álvarsmálið og harvið fyribyrgt eini møguligari komandi vanlukku. Tað er líkasum ikki nokk bara við einum orðaskifti í miðlunum, tí har er so nógv annað, sum upptekur fólk, eitt nú komandi val. Eftir okkara tykki er hetta so mikið álvársligt og stórt evni, at tað átti at fingið innivist á ráðstevnu ella hoyring í Norðurlandahúsinum tíðliga í vár.

Um ikki Ráðið fyri Ferðslutrygd heldur hetta vera nóg stórt evni til slíkt tiltak, so kanska Vinnumálatýrið og Landsverkfrøðingsstovnurin taka tað upp. Miðlarnir vilja eisini geva sítt íkast. At valár er átti so eisini at gjørt, at okkara politikarar settu umræddu trygd ovarliga á evnislistar sínar.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

»Taliban« – ágangur á Landssjúkrahúsinum?

Jóhan Petur Davidsen
Leiðandi yvirlækni

Landssjúkrahúsið hevur í mong ár verið nýtt sum politisk kastibløka, sum politikarar javnan hava gjørt sær dælt av, væl stuðlaðir av fakfeløgum, sum hava nýtt Landssjúkrahúsið til fakfelagspolitiskan stríðsvøll. Sjúklingar verða tiknir til gíðsla í hesi eirindaleysu orrustu fyri at røkka snævurskygdum málum. Slík framferð hevur verið darvandi fyri arbeiði á okkara størsta arbeiðsplássi.

Eftir langt og tógvið stríð eydnaðist tað, við politiskari fyriskipan, at tilevna ein leiðslubygnað á LS, sum allir partar tóku undir við. Hesin íbirti vónina um, at nú fór friður at valda, so orka og tilfeingi betri kundi gagnnýtast til at menna arbeiðsplássið, sjúklinginum at gagni. Fyritreytirnar fyri hesum var sjálvsagt, at leiðslubygnaðurin fekk loyvi at virka, og at starvsfólk respekteraðu hendan.

Leiðslubygnaðurin á LS bleiv viðtikin fyri at skapa støðuleika, sum grundarlag fyri menning og framburði.

Ikki skuldi ganga long tíð, fyrr enn ein bólkur, í størstu vanvirðing fyri arbeiðsplássinum, við nýtslu av fjøðlmiðlunum og politiskum ágangi royndi at kroysta ígjøgnum ultimativ eginkrøv.

Flest allar deildir og virkisøki á LS kenna, at teimum væntar starvsfólk og ábøtur, hvat leiðslan hevur verið vælvitandi um. Trupulleikin er bert, at verður játtanin hækkað einastaðni, skal sama upphædd skarvast av onkra aðra staðni, tá tann samlaða játtanin skal haldast. Ein ófrávikilig skylda hjá einari leiðslu er at tryggja, at tann tøki peningurin verður nýttur á skilabestan hátt, so sum mest fæst burtur úr til endamálið fyri stovnin (heilsufremjan). Tað er jú skattborgarin, sum í síðsta enda skal gjalda. Tí má grundstøði altíð verða, ongantíð at geva meirjáttan, fyrr enn tey strukturellu viðurskiftini eru kannað og funnin hóskandi.

Eftir øllum at døma eru tað fleiri, sum ikki rættiliga hava fatað, hvat leiðslubygnaðurin inniheldur. Hetta kemur týðiliga til sjóndar í dulnevndum lesarabrævi frá »nøkrum sjúkrasystrum á B6«, sum letur skína ígjøgnum sjónarmiðið, at sjúkrarøktarstjórin, eftir teirra tykki, er longdi armurin hjá Sjúkrasystrafelagnum á Landssjúkrahúsinum. Hetta er grundleggjandi skeiv fatan. Sjúkrarøktarstjórin er fyrst og fremst leiðari í eini trímannaleiðslu við sjúkrarøktarfakligum innliti, somuleiðis sum læknastjórin ikki umboðar fakfelagspolitisk sjónarmið hjá læknabólkinum, men er leiðari við læknafakligum innliti.

Sum arbeiðstakari hevur ein altíð rætt at gera vart við óhóskandi arbeiðsviðurskifti. Um áheitanin ikki gevur gætur, er tað upp til ein sjálvan at taka persónligu fylgjurnar av hesum. Velur ein at siga seg úr starvi, eru viðurskiftini við arbeiðsgevarin at enda komin. At uppsøgnin verður nýtt í eini neyðtøku av arbeiðsstaðnum er at fara út um, hvat ein kann loyva sær, og átti ikki at vunnið frama nakrastaðni.

Sum leiðandi yvirlækni á skurðdeplinum eri eg í villareiða, hvussu eg framyvir skal ráðgeva innan mítt øki. B5 er størsta seingjardeild í deplinum, har starvsfólk knossast dagin langan og veita eina dygdargóða tænastu uttan at gremja seg, vælvitandi, at B5 hevur lægri starvsfólkamanning, størri røktartyngd og fleiri seingjarpláss enn B6. Støðan er lítið annarleiðis á skurðgongini, innan skrivararorkuna o. s. fr., har starvsfólk kýta seg og siggja eina æru í at veita eina nøktandi tænastu, uttan at grenja. Mangur man sita við einum beiskum ráki eftir í munninum og spyrja seg sjálvan: Gjørdi eg nú tað rætta? Eg royndi at halda játtanina, og hóast skjalprógvan og tøl at vísa á tørvin fyri meirjáttan innan mítt virkisøki, vann hetta ongar sømdir, meðan B6 við størstu vanviðing fyri galdandi mannagongdum, viðtøkum og leiðsluskipanum, vann frama við sínum krøvum. Hetta er ein dyggur smeitur fyri Landssjúkrahúsið og í síðsta enda Føroya fólk

Eru tað »taliban- metodirnar«, ið skulu nýtast fyri at røkka eina nøktandi normering, ella skulu vit framvegis halda okkum til tann skipaða bygnaðin? Hvat sigur skattborgarin til, at noyðast at gjalda fyri slíkan atburð? Tað vantar ikki nógv í, at so væl politikkarar sum fyrisiting hava mist tamarhaldið á landsins størsta arbeiðsstað.

Mær lysti at fingið eitt boð frá sjúkrasystrunum á B6 uppá, hvar tær halda, meirjáttanin til B6 skal verða tikin frá(???).

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

SEV: vatn heldur enn vind

Kári Thomsen

Stjórin fyri SEV, Klæmint Weihe, ger í Sosialinum 8. desember viðmerkingar til uppskot at seta vindmyllur upp í Føroyum. Nakað torskilt man tað vera hjá flestu føroyingum fyrst (27. november í ár í Sosialinum) at fáa at vita, at SEV er í samráðing við DONG um samstarv at seta vindmyllur upp í landinum, og at SEV í løtuni arbeiðir við frágreiðing um møguleikar og tørvin á at seta upp vindmyllur, og síðan 10 dagar seinri at lesa, at ongar ítøkiligar ætlanir eru, men at man ikki vil útihýsa onkuntíð seinni í tíðina at útbyggja við vindorku.

Støðugar orkukeldur
Vatnorka er ein av fleiri varandi orkukeldunum. Alduorka, streymorka, vindorka og sólararorka eru allar óstøðugar orkukeldur, ið virka á hvør sín hátt hvør til sína tíð. Til ber tí ikki at siga sum Klæmint Weihe, at vatnorka er ein betri orka enn vindorka, tó hann kundi nevnt, at vatnorka er einasta av varandi orkukeldunum, ið hevur dálking við sær og álvarsamt árin á náttúru og umhvørvi.

Einvegis satsing á kostnaðarmikla vatnorku, tá nógv bíligari og rein orka er tøk í nógva vindinum, tykist saka sakliga grundgeving. Sjálvt um nógvir dagar og vikur eru á sumri uttan dropa av himli, skróvturt undir hvørjum steini, einki drekkivatn og vatn til fiskaarbeiðið og hálvtómar byrgingar, so er næstan alla tíð so mikið av vindi, at myllan hjá SEV gevur væl av orku, mleið 38.000 kwt um mánaðin frá mai til august. Verður ov lítið regn í longri tíð, tømist vatngoymslan, og dieselmotorarnir mugu setast at koyra við fullari megi. Vindurin heldur fram, bert 4 m/sek er nokk til at fáa ravmagn. Úttalilsið hjá SEV-stjóranum um støðuga vatnorku og framleiðslu av ravmagni, tá tørvur er á tí, skal sjálvandi takast við fyrivarni.

Vetrarhálvuna er ov nógv vatn til ravmagnstørvin, og fer hetta tí óbrúkt um byrgingina og í annars turrløgdu ánna. Gott, at áin eisini fær vatn, men við tí ovurhonds stóra kostnaði, ein vatnorkustøð hevur, kundi avlopsframleiðslan verið goymd til summarturkin.

Livitíð
Klæmint Weihe samanber livitíð hjá vindmyllum við Eiði III verkætlanina, ið sum kunnugt er 15 km vatnsavningartunlar og 48 áarinntøk millum Funning og Funningsbotn. Antin gevur Klæmint Weihe við vilja ógreiðar upplýsingar, ella er hann skeivt endurgivin av blaðmanninum. Hetta kannar blaðmaðurin á Sosialinum um møguligt, og fær lesarin rættar upplýsingar.

Fleiri krøv
Stjórin nevnir einans trý krøv til øki, har vindmyllur kunnu setast upp. Støðugan vind, gott vegaamband og ein hápenningarlinja nær við. Krøvini eru nógv fleiri og av stórum og enntá stórri týdningi, enn at loyvi kann gevast til uppsetan av vindmyllum á annars góðum plássum við støðugum vindi, nýggjari háspenningarlinju og vegatgongd. Frítíðar- og rekrativ øki, tjóðgarðar, øki við vísindaligum, siðsøguligum ella t.d. friðingarorsøkum, serstøk fuglasløg, flytifuglar, flúgvileiðir og flogvøllir, antennur og parabolskipanir, fráleiki til búseting, ferðsluvegir o.a. eru eisini evni, ið eiga at viðgerast, tá vindmyllur skulu fyrireikast til uppseting.

Vindmyllur og Agenda 21
Klæmint Weihe sigur at enda í samráðu við Sosialin, at tað er órealistiskt og uttan fyri veruleikan at seta 39 myllur upp í Føroyum. Hetta er beinleiðis undanførsla og hevur einki við veruleikan at gera. Vit hava einamest í útjaðaranum eitt ov veikt útbygt ravmagnsnet við trupulleikum serstakliga á vetri, og er ein uppgáva hjá SEV, at vit hava eitt sterkt og helst niðurgrivið kaðalnet. Netið eigur ikki at vera ein forðan fyri vindorku – sjálvandi. Uppskotið Vindmylluatlas fyri Føroyar er langtíðarætlan til burðardygga samfelagsmenning sambært Agenda 21 og ítøkiligt ískoyti at minka 20% um koltvíiltudálkingina til ár 2020.

Hetta gerst á mest effektivan hátt við vindmyllum, ið eingi útlát hava til umhvørvið av nøkrum slag. Vit fáa sera bíligt ravmagn, spara náttúru- og umhvørvisvirðini, minka um flutnings- og oljuútreiðslur, álvarsamar dálkingarstøður, økja nógv um trivnað og møguleikar á útoyggjum og fáa nógv betri rakstur í vinnuna á landi.

At vindmyllu-veruleikin, ið føroyingar síggja dag um dag við t.d. innflúgvingarleiðina til Keypmannahavn, og annars kring um í grannalondunum, enn er órealistiskur fyri Klæmint Weihe, er sera óheppið í allar mátar.

Við miðvísari fyrireiking og útbygging av ravmagnsnetinum at taka ímóti vindorku frá veitarum, ið kunnu vera vindmyllufeløg og privatir veitarar, er uppgávan at seta tvær til tríggjar myllur upp um árið í t.d. 16 ár á ongan hátt órealistiskt. Ein skilagóð arbeiðsætlan kundi verið at byrja við Stóru Dímun og Koltri og útoyggjunum annars, ið ikki hava kaðalsamband til meginøkið. Ein 20 KW mylla gevur 60-70.000 KWt ella 6-7 ferðir tørvin á t.d. Stóru Dímun, og tvær 75 KW myllur í Skúvoy ella Mykinesi geva 500.000 KWt ella tað dupulta av tørvinum. Meirframleiðslan kann goymast og nýtast, tá tørvur er á henni ella til hita og onnur skilagóð og mennandi endamál.

Orku- og ravmagnsmálið er eisini ravmagnskostnaður, avgjaldsskipanir, fleirstreingjað framleiðsla, goymsla, nýggj tøkni, transmissións- og veitanarnetið, søla og umsiting, eftirlitspartur o.a. Her er nokk at tríva í í nýggja árinum.

Vindmylluatlas fyri Føroyar
Uppskotið Vindmylluatlas fyri Føroyar kann eftir nýggjár finnast á heimasíðuni hjá Oljumálastýrinum og verður eisini til keyps í nøkrum bókhandlum. Evni, ið verða viðgjørd, eru m.a. varandi orkukeldurnar, dálking frá vatn- og termiskari orku, Agenda 21 og norðurlendsku umhvørvisætlanirnar, goymsla av ravmagni, brennikyknur, umhvørviskrá 2001-2020, vindviðurskifti og mátingar, náttúru- og lendisviðurskifti, ravmagn 1999-2020, vindmyllur, orkubygnaður, umframt hópur av kelduávísingum.

Upplýsingar um vindorku og vindmyllur finnast í hópatali á sera góðari heimasíðu hjá Dansk Vindmølleindustri. Adressan er: www.windpower. dk

Á heimasíðuni hjá Reyters News Service fáast dagførd tíðindi innan m.a. orkuútbyggingar í heiminum. Adressan er www.planetark.org/dailynewsstory

Her eru t.d. fýra feskar nýggjheitir úr Onglandi og Skotlandi: 3,6 MW vindorkuparkin Parc Cynog Wind Farms í Wales. Tikin í nýtslu 10. desember í ár.

58,5 MW vindorkuætlan Cefn Croes, Ceredigion, UK. Undir fyrireiking, kostn. 400 mió. kr., nøktar tørvin hjá 35.000 húsarhaldum

100 MW vindorkuætlan Scottish-Southern Energy í Girvan. Undir fyrireiking.

600 MW vindorkuætlan í Norðurskotlandi. Verður fyrireikað av British Energy, ið er kjarnorkufelag. Undirsjóvarkaðal 640 km langur skal veita ravmagn frá fleiri off-shore vindmylluparkum til meginøkið.

Meiri áhugað finna europeiska vindatlassið á heimasíðuni hjá Dansk Vindmølleindustri. Ársins jólagávuhugskot kann vera anpartar í danska vindorkuídnaðinum, ið fáast hjá VMA-Børsen (Vind Mølle Andels Børsen). Adressan er www.vmab.dk

Norðuratlantsbólkurin virkar á egnum grundarlagi

TÍÐINDASKRIV

Norðuratlantsbólkurin virkar á egnum grundarlagi

Umboðið hjá Tjóðveldisflokkinum og teir báðir grønlendsku fólkatingslimirnir, Kuupik Kleist og Lars Emil Johansen, hava skipað Norðuratlantsbólkin á fólkatingi.

Endamálið er at samstarva um viðurkenning av tjóðarrættindunum hjá føroyingum og grønlendingum og at fáa allar upplýsingar á borðið um hernaðarviðurskifti, búskaparlig viðurskifti, og annað, sum higartil hevur verið dult fyri fólkinum í Grønlandi og Føroyum.

Norðuratlantsbólkurin fer harafturat at upplýsa um føroyska og grønlendska sjálvstýrisstríðið bæði í Danmark og í øðrum londum.

Hetta er ein søgulig avtala, sum vit eru sera fegnir um. Vit eru sannførdir um, at vit við hesum samstarvi fara at fáa nógv burturúr fólkatingsarbeiðinum, og at tað verður til frama fyri allar føroyingar og grønlendingar. – Og ikki bert til frama fyri einstaklingar og ávísar politiskar flokkar.

Av orsøkum, sum vit ikki kenna ella skilja, er stovnanin av Norðuratlantsbólkinum eftir øllum at døma fallin summum fyri bróstið í Føroyum. Løgmaður hevur sent formanandi brøv til føroysku fólkatingsumboðini, og Jóannes Eidesgaard hevur harðliga átalað Lars Emil Johansen fyri, at hann samstarvar við Tjóðveldisflokkin í Norðuratlantsbólkinum.

Tað undrar okkum stórliga, at Jóannes Eidesgaard og Anfinn Kallsberg, hvørs flokkar taptu fólkatingsvalið, nú royna at stýra tí, sum Norðuratlantsbólkurin ger á fólkatingi.

Men til tess at fáa allar misskiljingar burtur, fara vit við hesum at minna á, at

- Føroysku og grønlendsku fólkatingsumboðini eru vald av grønlendska og føroyska fólkinum, eftir at okkara stevnumið vórðu løgd fram til fólksins støðutakan.
- Norðuratlantsbólkurin fer at virka fult og heilt í samsvari við tey stevnumið, sum grønlendsku og føroysku veljararnir við síni atkvøðu hava álagt okkum at fremja í verki.
- Norðuratlantsbólkurin fer ikki á nakran hátt at lata seg stýra av skrivum og formaningum frá Jóannesi Eidesgaard og Anfinni Kallsberg. Vit standa ikki til svars fyri hesum báðum monnum, men fyri okkara veljarum.

Annars eru løgmaður og Jóannes Eidesgaard eins og øll onnur vælkomnir at venda sær beinleiðis til Norðuratlantsbólkin, um ivamál eru.

Vit vónum um eitt gott og meira samstarvshugað nýggjár.

Í Hoyvík og á Glyvrum 30. desember 2001

Høgni Hoydal
Tórbjørn Jacobsen

Sannleikin illa lýddur!

Hans Birgir Hansen

Tað finst eingin sannleiki illa lýddur av lygnum, uttan tá hesin hevur ringt við at vinna frama alment, fakliga, politiskt, átrúnaðarliga!

Tað er alt lygn, ið hevur lætt við at vinna frama alment, fakliga, poiltiskt, átrúnaðarliga, tá slíkt byggir á hvørvisjónir, ørvitisknokkum!

Tað finst so nógv órættvís framferð framd í tí dagliga innan føroyskar og danskar fyrisitingar í Havnini, ein fær trupulleikar av!

Tað er tá hesar ikki eru tillagaðar at tæna tí vanliga borgaranum sum forbrúkara av tænastum, ið skapa samskiftistrupulleikar!

Tað finst eingin skomm skapt í nøkrum avgreiðslufólki, ið ikki duga at nýta umhugsni, vit og skil í tí dagliga arbeiði í Havnini!

Tað er ikki so frægt, at avgreiðslufólk eru tilvitað um starvsfelagar eru á arbeiðsplássi/á fundi/á skeiði /uttanlands/heima!

Tað finst einki forstáilsi fyri at slíkt órógvar vanligar borgarar sum forbrúkarar, tá hesir skulu tilrættaleggja skyldur!

Tað er tíverri eitt fíggindaligt sinnað fyrisitingarligt virksemi, ein í tí dagliga í Havnini stríðist við hvønn dag.

Tað finnast nógvir grundleggjandi skeivleikar í stýrisskipanum/lóggávum/mannagongdum/kunngerðum/reglugerðum!

Tað er tíð uppá at fáa endurskoðað/dagført slíkar skipanir/lógir/mannagongdir v.m.!